# 2007

## ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR




# ÍF – KÍ

**1. deild menn**

**Leygardagin 7. juli 2007 Kl. 18.30 í Fuglafirði**

HAVSBRÚN

TOYOTA

HARALDSEN
-títt keyp-

P/F Petur Larsen

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel 444636 / 228771
Fax 444634
www.if.fo
if@if.fo

**Leikskrá 4 2007**

**Útgevari:**
**ÍF-fótbóltur**

**Ábyrgd**
ÍF-fótbóltur

**Blaðnevnd**
Steinbjørn í Lambanum
Rógvi Róin

**Myndir**
Rógvi Róin

**Kápumynd**
Nenad skorar í dystinum ímóti TB
(Mynd: Rógvi Róin)

**Prent**
Føroyaprent
tel 314555

**Uppseting**
Hannis Egholm
tel 311836

# TAÐ HALDA VIT

Teir báðir seinastu dystirnir ímóti ávíkavist TB á Varmakeldustevnuni og B36 í Gundadali mikukvøldið er prógv um, at vit hava eitt gott lið, hóast fleiri av føstu leikarunum ikki eru tøkir.

Leygardagin á Varmakeldustevnuni leiktu okkara menn sera sannførandi, og TB´arnir vórðu blástir av vøllinum. Hetta hóast bæði Bartal og Árni – sum báðir er á Oyggjaleikunum við flogbóltslandsliðnum – manglaðu. Teir hava verið rímuliga fastir á liðnum – tó hevur Bartal seinastu dystirnar verið plágaður av skaða, og tískil ikki leikt við fullari ferð – og eru teir báðir sera týðandi, serliga í luftspælinum. Tí uttan teir báðar, er Høgni einasti leikarin, sum veruliga kann bjóða seg fram í "luftrúminum". Sannførandi 4-1 sigurin á TB var ikki eitt mál ov stórur.

Mikudagin vóru vit í Havn har vit leiktu ímóti botnproppinum B36. Hóast sera vánlig úrslit higartil í ár og samsvarandi vánaliga støðu á stigatalvuni, er liðið slett ikki so galið. Teir hava styrkt seg seinastu dystirnar og málið er nokk at verða verandi í deildini. Og ta sást eisini aftur mikukvøldið; teir stríddust fyri sakini og høvdu góðar møguleikar. Men tá vit so fáa fyrsta málið, yvirtaka vit dystin og leika til tíðir sannførandi. Hetta hóast bæði Bartal, Árni, Frank og Atli mangla. Frank var leikbannaður og Atli farin í summarfrí. Umframt hesar fýra vóru Jan og Vincent heldur ikki tøkir, og tað eru teir heldur ikki í dag.

Vit halda, at tað at okkara menn megna at leika sannførandi OG vinna dystir hóast fleiri av føstu leikarunum ikki er tøkir, kann fáa avgerðandi týdning fyri útfallið av kappingini í ár. Um tað røkkur til uppflyting, fara vit ikki at geva okkara boð uppá, men vit halda, at tað FÆR týdning. Livst so spyrst!

Góðan dyst og framhaldandi gott summar.



# Meg minnist !

Í hesum teigi, sum vit hava valt at kalla "Meg minnist" fara vit at leita upp fyrrverandi ÍF´arar, fara at siga teirra ÍF-søgu og eitt sindur um lív teirra nú.



Gesturin, ella fyrrverandi ÍF´arin í dag, er ein kendur málmaður, tó iki á vøllinum. Jógvan í Lon Jacobsen, adjuntur í málfrøði.

## Jógvan í Lon málfrøðingur

**Føddur**
Í Fuglafirði í 1957, so útlit eru til ball!

**Byrjaði at leika við ÍF**
Minnist ikki árið, men tað hevur helst verið við piltum ella smádreingjum. Sum smádrongur "búði" eg uppi á plenuni, sum vit søgdu tá. Nú er alt so føroyskt, so nú eitur tað á vøllinum í Fløtugerði.

**Á besta liðið fyrstu ferð:**
Tað mundi helst vera á íslandstúrinum í 1973 (ella -74) við Ørn Eyjolfsson sum venjara.

**Dystir og hendingar eg minnist**
Tá vit vóru í Íslandi hetta árið, minnist eg, at vit spældu ein dyst á Borgarnesi. Tá kom ein óður maður inn á vøllin við knívi. Hesin túrurin var annars minniligur. Fóru við Ólavi Halga til Akureyri og við bussi suður til Selfoss. Ólavur Halgi førdi okkum heim aftur eisini, og tá minnist eg, at eg slapp at læna koyggjuna frá Tórfríði Abrahamsen.

**Leikarar eg minnist best**
Tað vóru nógvir góðir spælarar, t.d. Meinhard Dalbúð, Kristian Petersen, Kaj Eli Poulsen, Jan Nielsen og Ábraham Løkin. Kann til stuttleika nevna, at Dávur Juul og eg spældu í verjuni hjá piltum ella smádreingjum. Vit høvdu Teodor Jacobsen sum venjara. Hann kallaði okkum Gjógvarámúrin, so tað hevur helst ikki verið so galið.

**Venjarar**
Øll tey fyrstu smádreingjaárini høvdu vit ongan venjara. Tað var eitt øgiligt framstig, tá ið vit fingu venjara. Ungdómsvenjararnir hjá okkum vóru m.a. Hjalmar Joensen og Teodor Jacobsen. Ørn Eyjolfsson mundi helst vera ein av teimum fyrstu fyrstu professionellu venjarunum hjá ÍF. Hann búði í húsunum hjá Líggjasi við Gjógvará.

**Framhald á bls. 26**

HAVSBRÚN

Tel. 41 44 00 · Fax 41 44 01 · havsbrun@havsbrun.fo · www.havsbrun.fo

HYDRAULIKK-
SLANGUR




KJ Hydraulik er veitari av fyrsta floks hydraulikkslangum til kundar í Føroyum, Danmark, Íslandi, Hetlandi, Skotlandi og Norra.

Vit útvega allar hydraulikkslangur skjótt og væl. Slangurnar verða framleiddar á goymslum okkara á Kambsdali og í Havn.

Slangurnar fáast við 1-lags, 2-lags, 4-lags og 6-lags stálarmering. Støddir eru frá 3/16" til 2".

DNV

KJ HYDRAULIK
POWER & MOTION CONTROL

**Kambsdalur:** 530 Fuglafjørður **Tórshavn:** 110 Tórshavn · Mykinesgøta 3
Tel 444 170 · Faks 444 265 · info@kj.fo · www.kj.fo



P/F Petur Larsen
Mekaniskur verkstaður

postboks 64
530 Fuglafjørður
tel. 444 174
fax 444 285
al@online.fo

BAADER®

fomaco


TOYOTA
AURIS
Kom og royn tann nýggja Auris. Prísir úr kr. 215.000
REYNI SERVICE"


www.hh.fo
90°
75°
BYGGIRÁÐ
TIMBUR . AMBOÐ . INNBÚGV
-alt á einum stað!
TIMBURHANDILIN
Runavík Tel. 477272 . Fuglafjørður Tel. 444126 . Klaksvík Tel. 455149


opið er soleiðis:
mánadag-fríggjadag 18.00-23.00
leygardag 17.00-23.00
sunnudag 09.00-10.30 og 14.00-23.00
altíð nýbakað breyð
hot dog
høsnarungaspjót
kúluís
KIOSKIN HJÁ BASSA

# GRINDABOÐ

**Hvat hava grindaboð við fótbólt at gera? Nei, ikki so nógv, men tá hugurin at penta eina søgu saman treingir seg inn á ein, tá ber alt til, eisini at skriva um grind í eini leikskrá.**

Í hesi modernaðu tíðini nú á døgum, er eitt digitalkamera – ella talgildað myndatól – hvøns mans ogn, og verða tískil sera nógvar myndir tiknar millum ár og dag. Og einki er at taka seg aftur í, at nógvar myndir eru stak góðar, ikki minst tær vit javnan síggja tiknar av fjøllunum niður yvir bý okkara og náttúrumyndir annars, eitt nú á heimasíðuni "www.fuglafjordur.com" hjá Jóhan Hera og aðrastaðni eisini. Á skriviborðinum á teldu míni, havi eg eina mynd, sum eg sjálvur tók fyri nøkrum árum síðani. Hon er av einum grindadrápi í Fuglafirði, í teimum døgum meðan vit enn høvdu eitt lið í Formuladeildini, og teir báðir Sylla og Gunnar enn vóru ÍF'arar.

Nú vit fáa vitjan av næstbesta liðnum hjá KÍ, kom eg at hugsa um, hvussu nógv er broytt seinastu árini, ikki minst nú tað bert tekur góðar 10 minuttir at koyra millum býirnar. Fyri fáum árum síðani tók tað ein heilan dag hjá klaksvíksingum, at koma higar til ein fótbóltsdyst, og tá mátti dysturin sjálvandi leggjast eftir ferðaætlanini hjá Ternuni ella Dúgvuni. Hóast hetta, so var tað ikki altíð vist, at fólk sluppu til hús






aftur í bræði, um ikki ferðast varð við onkrum útróðrarbáti.

Og tað var júst hetta við útróðrarbátunum, sum fekk meg at hugsa um ta ferðina, tá vit leiktu ein sera spennandi steypadyst móti KÍ í Fløtugerði. Nógvir útróðrarbátar vóru komnir henda vegin við áskoðarum. Tað var gamalt her, at ein kundi síggja tað á klaksvíks-bátunum, hvussu KÍ'arnir høvdu kláráð seg á vøllinum, tí høvdu teir tapt, so gjørdu teir skjótt av og sluppu sær stillisliga avstað – ein og ein uttan nakað hóvasták. Henda dagin hevur KÍ helst vunnið steypadystin, tí tá kampurin var liðugur, loysti allur flotin frá landi í senn, og við levind og gang stevndu teir út móti Enninum – í sera góðum skørum aftur til Klaksvíkar. Tá var tað, at fleiri fuglfirðingar, sum ikki høvdu áhuga í fótbólti, hildu at tað var grindaboð. Tá sigst tað, at onkur kom stunandi oman gjøgnum Hammersabrekku við sóknarongli og tjúkkum togenda um herðarnar og stórum grindaknívi í beltinum, tí tað var ikki á hvørjum degi at tað var grind á okkara polli.

Myndirnar frá grindadrápinum eru ikki frá tí degnum tá ÍF og KÍ spældu steypadyst á sinni, men eru tiknar hin 2. mai 2005, tá 116 hvalir løgdu beinini á sandinum í Fuglafirði.












# Fuglafjørður

býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak
býurin, har náttura og fólk eru blíð
býurin, har fortíð og nútíð hittast
býurin, har øldirnar tala

**Stutt sagt:**
býurin, har nógv hendir
býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar Kommuna**
P.O. Boks 30 · tel. 444006 · fax 444657
fko@fuglakomm.fo
www.fuglakomm.fo

Rustviðgerð
ella forrútar

vit hava loysnina

BE
AUTOGLAS

Í Brekkum 1
530 Fuglafjørður
tel. 444 215
fax 444 813
fartel. 220 876

fk

Fuglafjarðar
Keypsamtøka

Tel. 444 095 - 444 495 Fax 444 895

Fuglafjarðar Træsmiðja

Snikkaraarbeiði
- Vindeygu
- Úthurðar
- Trappur
- Umvælingar

Tel: 44 42 34
Tel: 21 42 34
Toftagøta 12
530 Fuglafjørður

Fuglafjarðar Træsmiðja
við Jóhan Larsen

Piddasahandil
og
Ribarhús

listaframsýningar
heimavirkaðir prýðis- og brúkslutir
føroyskt - »bundið og tøvt« í meturmál
føroyskar fløgur
loppumarknaður
- og altíð ein kaffimuður við »heimabakaðum«

opið er: mán. - frí. 15.00 - 17.30
ley. 11.00 - 13.00
annars eftir avtalu á tlf. 44 44 27



hugnaligt og kveikjandi umhvørvið mitt í býnum í Fuglafirði

P/f Sveisingahandilin

Mykinesgøta 8 · FO-100 Tórshavn · Tlf. 311909

**SANDGREVSTUR P/F**
Norður í Gerði 7
530 Fuglafjørður

Stovnað 1949 - reiðarí innan frakt- & sandbátar

- Norskur stoypisandur
- Hvítur stoypiskervur
- Hvítur skervur til tún
- Reyður skervur til tún
- Fø. stoypi- og pussisandur
- Rall
- Sandblásisandur
- Betongflísar

Koyring við kranalastvognum
fyri fastar prísir (eisini til Tórshavnar)

tel 444121 • 595900 • 595910

we make fishing more profitable

Vit framleiða og umvæla:
- Rækjutrol
- Botntrol
- Flótitrol
- Semi-pelagisk trol
- Snurpunótir

Vit framleiða ta nýggju skiljiristina til:
- Pelagiskan fiskiskap

Vit framleiða og umvæla nótir til alivinnuna umframt:
- Vaska og impregnera nótir
- Veita komplettar fortoyningar

Vit hava útgerð til trol, nótir og alivinnuna á goymslu





VÓNIN
www.vonin.com

Vónin Ltd.
P.O. Box 19
FO-530 Fuglafjørður
Tel +298 47 42 00
Fax +298 47 42 01

Vónin Tórshavn
Vestara Bryggja 12
FO-100 Tórshavn
Tel +298 35 43 91
Fax +298 31 33 19

POUL JOENSEN
AVSKERING AV SKRÚÐUM

- Avskering av skrúðum
- Myndaupptøka
- Videoupptøka
- onnur smá arbeiði

Bøvegur 10
530 Fuglafjørður
Tlf: 44 46 42
Mobil: 21 31 95
Fax: 44 42 95





BERGFROST
COLD STORAGE

P.O. Box 85
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
www.bergfrost.com

Tel +298 474 646
Fax +298 474 647
Mobile +298 223 667
bergfrost@bergfrost.com

POUL JOENSEN
LAST & KRANAVOGNSKOYRING

- Last & Kranavognskoyring
- Mini Gravimaskinur
- Mini Lessari
- Útgrevstur við Brøyt
- Betong & Asvaltsaging
- Og mangt annað

Bøvegur 10
530 Fuglafjørður
Tlf: 44 46 42
Mobil: 21 31 95
Fax: 44 42 95





FRUMSÝNING

ACTYON
pers 308.056 v/mvg
van 264.214 v/mvg





SSANGYONG

Spildurnýggi Actyon borgar fyri nýskapandi sniðgeving, tí nú snýr tað sum ein einastandandi sportscoupé við SUV-eginleikum. Innrættaður við svørtum designaraelementum, stylaður við kromi og leðurratti, veitir hann meinlíkar upplivingar í tráð við sports- og coupébilar, sum er nakað heilt nýtt innan SUV-heimin. Samstundis veitir smarta SUV-sniðið full-komna koyrivælveru umfram eitt sera hent vørurúm. Actyon fæst við 2,0 Commonrail dieselmotori, ið veitir 141 hestar og hevur eit moment uppá 310 Nm. Hann megnar at sleipa ikki minni enn 2,1 tons, so eingin trupuleiki er at fáa rasarabátin við uppá krókin. Minnst til at sjálvt standardútgerðin er full av útgerð millum annað ESP, ARP, HDC, ABS, ABD, ektað 4x4, dubult airbags, gardin airbag, útvarp/fløguspælari og el-síðu-spegl. KOYR ACTYON, SKIL TEG ÚT.

LUKSUS
4WD

SSANGYONG
www.ssangyong-faeroerne.dk





NÝGGJUR
7 pers. +viðføri

KYRON CURIOUS
pers 324.849 v/mvg
van 248.089 v/mvg

REXTON II
pers 403.294 v/mvg
van 296.979 v/mvg

RODIUS
pers 319.258 v/mvg

BILVERKSTAÐIÐ
v/Hans Jacob Kollsker Á Hjalla Tel 311013 Fax 321015 www.kollsker.com

## Lastvognskoyring



Øll lastvognskoyring verður gjørd

**Kári Zachariassen**

530 Fuglafjørður
tel 444 245 ella 217 245




SKIPASMIÐJAN

www.faroeyard.fo

PJ PROLAKK — FØROYA MEST FRAMMKOMNI PLÁTU- OG LAKKERINGSVERKSTAÐUR —



PROLAKK
Í februar 2007 byrjaði Prolakk sítt virksemi í nýggjum hølum hjá P/F Bilasøluni við Vegin Langa í Hoyvík. Eyðkennið við Prolakk verður at veita eina dygdargóða tænastu, við framkomnari tøkni har kundin er í hásæti. Skjótt og væl úr hondum greitt arbeiði verður eyðkennið hjá fyritøkuni.

Verkstaðurin heldur til í sera snotiligum hølum við framkomnum amboðum. Í felagnum starvast fólk við sera drúgvum royndum, sum hava nógv ár á baki innan plátu- og lakkeringsarbeiði. Eisini nýtur verkstaðurin einans umhvørvisgóðkent tilfar.

Hevur tú tørv at fáa skaða gjørdan, tryggingarskaða ella skaða yvirhøvur, set teg í samband við okkum, so sýna vit bilin eftir avtalu.

www.prolakk.fo
prolakk@prolakk.fo

SP/F PROLAKK • VEGURIN LANGI • 110 TÓRSHAVN • POSTSMOGA 1393 • TLF.: 311252 • FAX: 311253

Sp/f **Jan Mohr**
Byggivirkið

Tlf: 21 99 49 • 21 89 49

## URTAGARÐURIN

V/RITU LARSEN

TEL.: 22 38 12



FINNUR FRÍÐI • FD 86



TRÓNDUR Í GØTU • FD 175

## P/F VINNAN
GØTU




**KUNNINGARSTOVAN Í FUGLAFIRÐI**
INFORMATION OFFICE

*Opið:*

| | |
|---|---|
| *Mánadag - fríggjadag* | *kl. 9-12 og 13-17* |
| *Leygardag* | *kl. 9-12* |

FO-530 Fuglafjørður
Tlf. (+298) 44 48 60 - Fax (+298) 44 51 80
t-post: infoey-f@post.olivant.fo

**FUGLAFJARÐAR BÓKASAVN**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 44 47 45 - Fax 44 51 80
t-post: bokasavn@atlantic.fo

*Opið:*

| | |
|---|---|
| *Mánadag - fríggjadag* | *kl. 9-12 og 13-17* |
| *Leygardag* | *kl. 9-12* |




**Álvaskot**
Fysioterapiviðgerðarstova
530 Fuglafjørður
Telefon 44 51 44
Álvur Hansen, fysioterapeutur












Jørleif Petersen
*málarameistari*

Fuglafjørður
tel. 444 395 fartel. 214 395

Alt málaraarbeiði verður gjørt!









**Rasmus Joensen**

**Málarameistari**

**530 Fuglafjørður**

**Tel. 444 139 - 214139**











Málingina fáa tit frá
Profa Farvum í Fuglafirði
Kom inn og fá eitt tilboð

profa FARVUR botex
v / Símun Fornagarð · Tel. 44 5044 · Fax.: 50 45 45
530 Fuglafjørður · Karvatoftir

Ninni
Parfumeri · Lingeri





www.if.fo











## Tannlæknastovan

**Steintór Larsen** | tannlækni

**Elin Stampe** | tannrøktari

**Viðtala:**
8.00-12.00 og 13.00-16.00

Torkilskrókur 8 | 530 Fuglafjørður | tel 444 358






## HVÍ VELJA EINA KNASSAR HEIMASÍÐULOYSN?

**Ein Knassar Lime heimasíðuloysn hevur m.a. hesar fyrimunir:**

- fær góð leitiúrslit á Google og øðrum leitimaskinum.
- sær líka út í øllum browsarum og á øllum teldusløgum.
- koyrir á skjótum og tryggum servara, við m.a. dagligum back-up og døgnvakt.
- sniðið kann uppfrískast eftir tørvi, uttan at skifta skipan ella broyta nakað í innihaldinum yvirhøvur.
- tað er altíð onkur knassi klárur at hjálpa, um spurningar eru.




Ring í dag á 73 33 33 ella skriva til knassar@knassar.fo og hoyr, hvussu tú kanst fáa bestu heimasíðuloysnina. Vitja www.knassar.fo fyri at síggja ymiskar Knassar heimasíðuloysnir.

Á Knassar starvast 21 fólk, ið brenna fyri at gera heimsins bestu heimasíðuloysnir. Knassar hava fleiri enn 100 heimasíðukundar í Føroyum og uttanlanda.

**Framhald frá bls. 3**

**Fótbóltur aftaná ÍF**
Eg gavst heilt at spæla fótbólt, stutt eftir at eg var farin á studentaskúlan í Hoydølum í 1974. Synirnir báðir, Herbert og Rúnar, spæla við B36, so nú standi eg sunnudag eftir sunnudag og rópi á B36 – saman við einum øðrum hálvgomlum ÍF'ara, Jan Nielsen.

**Lærdómur, familja og lívið**
Tók prógv sum magistari í norrønari málfrøði í 1991. Havi síðan 1988 arbeitt á Føroyamálsdeildini. Giftist í 1991 við Andreu ættað úr Vík, og vit eiga tveir dreingir, Herbert, føddur í 1979, og Rúnar, føddur í 1989. Mítt motto er: Les og lær, men gloym ikki at liva.

**Børn og ítróttur**
Gev børnunum tær allarbestu umstøður til at íðka ítrótt. Tí sum teir gomlu grikkarnir søgdu: Ein sunn sál í einum sunnum likami.

**Fótbóltur í dag**
Í dag spæla leikarar fyri eitt felag, fyrr spældu teir við einum felag. Grundin til hesa broyting eru pengarnir. Teir spæla fyri tað felagið, har teir fáa mest pengar. Tað er spell, tí at hjartað liggur ofta goymt á heilt øðrum stað.

**Góð ráð til ÍF**
Gevið teimum ungu so góðar ítróttarligar umstøður sum gjørligt. Gerið teir ytru karmarnar um ítróttin so góðar sum til ber. Gerið langtíðaríløgur í ungdómsarbeiðið heldur enn at fáa løtuvinning burtur úr fremmandum leikarum.






## STØÐAN 1. DEILD - 5. JULI

| | Lið | D | V | J | T | V - T | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B68 (n) | 15 | 14 | 1 | 0 | 54 - 9 | 46 |
| 2 | FSV04 | 15 | 11 | 3 | 2 | 31 - 19 | 36 |
| 3 | ÍF (n) | 15 | 9 | 4 | 3 | 40 - 15 | 31 |
| 4 | LÍF | 15 | 8 | 1 | 7 | 33 - 25 | 25 |
| 5 | NSÍ (u) | 15 | 7 | 1 | 8 | 31 - 35 | 22 |
| 6 | TB | 14 | 5 | 3 | 7 | 20 - 19 | 18 |
| 7 | SÍ | 15 | 4 | 3 | 9 | 19 - 30 | 15 |
| 8 | HB | 14 | 4 | 2 | 9 | 20 - 36 | 14 |
| 9 | KÍ | 15 | 3 | 2 | 11 | 18 - 42 | 11 |
| 10 | B36 (u) | 15 | 2 | 2 | 12 | 16 - 51 | 8 |

## LEIKARAHAGTØL 1. DEILD 2007

| | Leikari | Min | D | Út | Inn | G | R | M | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | András Gango | 1.260 | 14 | - | - | - | - | (13) | - |
| 2 | Áki Petersen | 1.206 | 14 | 2 | - | - | - | - | - |
| 3 | Tórður Lervig | 925 | 12 | 5 | 1 | 1 | - | - | - |
| 4 | Nenad Saric | 1.066 | 12 | 1 | - | 1 | - | 8 | - |
| 5 | Elvan Taser | 1.067 | 14 | 3 | 2 | 3 | - | 3 | - |
| 6 | Bartal Eliasen | 779 | 11 | 2 | 2 | 3 | 1 | 6 | - |
| 7 | Aleksander Jovevic | 862 | 11 | 6 | 1 | - | - | 2 | - |
| 8 | Fritleif í Lambanum | 990 | 11 | - | - | 2 | - | - | - |
| 9 | Amin Fallah | 683 | 12 | 6 | 3 | - | - | 2 | - |
| 10 | Atli Petersen | 750 | 13 | 6 | 6 | 1 | 1 | 5 | - |
| 11 | Frank Poulsen | 1.080 | 14 | 2 | 2 | 3 | 1 | 1 | - |
| 12 | Árni Petersen | 913 | 11 | - | 1 | 2 | - | 1 | - |
| 13 | Dánjal Pauli Højgaard | 236 | 5 | 2 | 2 | 1 | - | 3 | - |
| 14 | Jan Ellingsgaard | 130 | 7 | - | 8 | - | - | 1 | - |
| 15 | Heri Nesá | 419 | 7 | - | 3 | 1 | - | - | - |
| 16 | Emil Toftegaard | - | - | - | - | - | - | - | - |
| 17 | Høgni Zachariassen | 1.260 | 14 | - | - | 2 | - | 1 | - |
| 18 | Vincent Jacobsen | 184 | 5 | 1 | 4 | - | - | 2 | - |
| 19 | Eyðun Rygqshamar | 1 | - | - | 1 | - | - | - | - |
| 20 | Uni R. Petersen | 4 | 1 | - | 1 | - | - | - | - |
| 21 | Jonn Thomsen | 45 | 1 | 1 | - | - | - | - | - |
| 22 | Eyðun Madsen | | - | - | - | - | - | - | - |

*FRÁGREIÐING: D: Dystir, Min: Minuttir leiktir, Út: Dystir útskiftur, Inn: Dystir innskiftur, G: Gul kort, R: Reyð kort, M: Mál, Stig: í kappingini ársins ÍF-ari*

**Aðrir dystir í 1. deild í dag – 17. umfar**
B68 – NSÍ
LÍF – B36
SÍ – HB
TB – FSV04

**Dystir í 1. deild leygardagin 4. august – 18. umfar**
FSV04 – HB
B36 – TB
KÍ – LÍF
NSÍ – ÍF
SÍ – B68

**Dystir í Formuladeildini sunnudagin 8. juli – 16. umfar**
NSÍ – KÍ
EB/Streymur – B71
AB – Skála
GÍ – VB/Sumba
HB – B36 (leiktu 27. juni; 0-2)

**Málskjúttar 1. deild**

| | |
|---|---|
| Andrzej Stretowicz, FSV | 13 |
| Jósup Henriksen, B68 | 12 |
| A. Castilho, B68 | 11 |
| Dánial Hansen, B68 | 11 |
| Sonni L. Petersen, NSÍ | 10 |
| Adrian Joensen, LÍF | 9 |
| Bartal Eliasen, ÍF | 8 |
| Jørgen Meitilberg, SÍ | 8 |

**VERT AT VITA**
Dysturin í dag móti næst besta liðnum hjá klaksvíkingum er annar dysturin ímóti teimum í ár. Fyrri dysturin varð leiktur í Klaksvík 6. mai. Ta ferðina vunnu vit sannførandi 0-3. Málskjúttar vóru Nenad, Amin og Atli.
Áðrenn dystin í dag hava klaksvíkingar 11 stig og eru teir á einunum 9. plássi á stigatalvuni. Vit hava 31 stig, 5 stig færri enn FS Vágar 2004 á 2. plássi.



ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR

## ÍF-LIÐIÐ

1 Andràs Gàngo
2 Áki Petersen
3 Tórður Lervig
4 Nenad Saric
5 Elvan Taser
6 Bartal Eliasen
7 Aleksander Jovevic
8 Fritleif í Lambanum (liðsk.)
9 Àmin Fallah
10 Atli Petersen
11 Frank Poulsen
12 Árni Petersen
13 Dánjal Pauli Højgaard
14 Jan Ellingsgaard
15 Heri Nesá
16 Emil Toftegaard
17 Høgni Zachariassen
18 Vincent Jacobsen
20 Uni R. Petersen

**Venjari**
Jón Simonsen
**Hjálparvenjari**
Roy Róin
**Liðleiðarar**
Símun Fornagarð
Dia Jacobsen

## KÍ-LIÐIÐ

1 Mathias Samuelsen
2 Atli Simonsen
4 Tórbjørn Justinussen
5 Rudolf Eliasen
6 Steffan Kalsø
7 Álvur Christiansen
8 John Hammer (liðsk.)
9 Asbjørn Tungá
10 Jón Jacobsen
11 Kristian Andreassen
12 Marek Wierzbicki
14 Andrias Ellingsgaard
15 Atli Jacobsen
16 Heri Thorsteinsson
20 Fríðin Ziskason
21 Eli Simonsen

**Venjari**
Trygvi Mortensen

**Jan Skoradal - hjálpardómarar úr GÍ**

**Petur Larsen**